

Mynd frá ráðharrafundi í Nuuk í 2011. Frá vinstru: Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður, Carl Bildt, Hillary Clinton, Jonas Gahr Støre, Lene Espersen og Jaakko Laajva.

# Løgmaður á ráðharrafund í Arktiska ráðnum

**Hallur av Rana**

22.04.2015 - 12:58

Oljan.fo

Komandi fríggjadag og leygardag luttekur Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður, á ráðharrafundi í Arktiska ráðnum, ið verður hildin í Iqaluit, Nunavut, Kanada.

- Flestu evnini, sum verða viðgjørd í Arktiska ráðnum, eru yvirtikin málsøki, og Føroyar eru við til at orða og menna avgerðir, sum verða tiknar, so at tær hóska til føroysk viðurskifti. Føroyar liggja við høvuðsdyrnar til Arktis, og hetta kann fáa stóran politiskan og búskaparligan týdning komandi árini, sigur Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður, við heimasíðuna hjá Løgmansskrivstovuni.

Talan er vanliga um ein politiskan toppfund tá Arktiska ráðið savnast, og uttanríkisráðharrar hjá arktiskum stórveldum sum Russland og USA taka vanliga lut í

fundinum. So er eisini hesaferð, tí tað er amerikanski uttanríkisráðharrin, John Kerry, ið var forsetavalevnið hjá Demokratunum til valið í 2004, ið tekur við formansskapin á hesum fundi. Seinasti tvey árini hevur tað verið Kanada, ið hevur umsitið formansskapin, men verður hann nú latin USA.

Arktiska ráðið er einasta formliga millumtjóðasamstarv um arktisk viðurskifti. Limalondini eru USA, Russland, Kanada, Svøríki, Finnland, Noreg, Ísland og Danmark/Grønland/Føroyar.